**Góðkenning lønargrundarkort**

Stovnsleiðslan hevur ábyrgdina av, at tær lønir, ið verða útgoldnar undir stovnsnummarinum hjá viðkomandi stovni, eru rættar. Fyri at geva stovnunum møguleika at eftirkanna hetta, sendir gjaldstovan hjálagt lønargrundarkort fyri tey starvsfólk á tygara stovni, sum nú eru skrásett í lønarskipanini hjá gjaldstovuni við einum føstum lønargjaldsordra.

Fíggjarmálastýrið, Lønardeildin sendir stovnunum eitt yvirlit yvir galdandi lønartalvur, ið verða brúktar til gjøgnumgongdina.

Stovnurin skal árliga kanna eftir, at samsvar er millum skrásettu upplýsingarnar í lønarskipanini og formligu setanaviðurskiftini. Er ósamsvar, skal verða gjørt skrivliga vart við hetta.

Stovnurin skal góðkenna lønargrundarkortini og senda tey aftur til Føroya Gjaldstovu, lønarbókhaldið innan eina freist, sum verður fráboða. Gjaldstovan ger so støðuna upp fyri viðkomandi aðalstýrum og Grannskoðanardeild Landskassans.